## Anja og Bogi



*Hvør keypir jólagávurnar, ið verða latnar frá tykkum?*
Anja: – Tað er altíð eg, sum keypi gávurnar.
*Hvussu nógvar gávur keypa tit tilsamans?*
Anja: – Vit keypa umleið 40 gávur tilsamans.
Bogi: - Keypa vit 40 jólagávur?
Anja: -Ja, eg havi longu keypt meiri enn 20, haha.
*Plaga tit at keypa stórar gávur til hvønn annan?*
– Nei, eg haldi ikki, at vit keypa so øgiliga stórar gávur til hvønn annan. Men gávurnar til hvønn annan eru allíkavæl størri enn gávurnar til øll hini.
*Eru tað egin hugskot ella fáa tit ein nágreiniligan ynskilista við frá makanum?*
– Nei, vit finna altíð gávurnar sjálvi.
*Nær verða jólagávurnar keyptar?*
– Vit eru altíð í góðari tíð. Tað er einki við at renna runt 23. og leita. Her er skil í, haha.

## Hervør og Bárður



*Hvør keypir jólagávurnar, ið verða latnar frá tykkum?*
– Vit keypa bæði jólagávurnar. Og vit gera eisini nógvar sjálvi. Her er einki organiserað, tá tað kemur til jólagavurnar. Tað er rættiliga tilfeldigt, hvussu tað er ár um ár.
*Hvussu nógvar gávur keypa tit tilsamans?*
– Vit geva einar 15 jólagávur hvørt ár.
*Plaga tit at keypa stórar gávur til hvønn annan?*
– Ja, gávurnar til hvønn annan eru nokk so stórar.
*Eru tað egin hugskot ella fáa tit ein nágreiniligan ynskilista við frá makanum?*
Bárður: – Nei, eg havi ongantíð fingið nakran ynskiseðil frá henni.
Hervør: - Eg fái heldur ikki ynskiseðil. Eg veit hvat hann ynskir sær, honum nýtist ikki at skriva mær ein lista.
*Nær verða jólagávurnar keyptar?*
Bárður: – Tað er eisini ymiskt. Tað er ofta beint upp undir jól, kanska tollaksmessudag.
Hervør: - Men tá man ger gávurnar sjálvur, má man sjálvandi í gongd um heystið.

## Hanna og Lars



*Hvør keypir jólagávurnar, ið verða latnar frá tykkum?*
Lars: – Tað er nokk umleið helvt um helvt. Eg plagi at keypa til tey vaksnu, og Hanna plagar at keypa til børnini.
*Hvussu nógvar gávur keypa tit tilsamans?*
– Tað liggur nokk um 50 gávur.
*Plaga tit at keypa stórar gávur til hvønn annan?*
– Ja, vit geva altíð hvørjum øðrum stórar gávur.
*Eru tað egin hugskot ella fáa tit ein nágreiniligan ynskilista við frá makanum?*
Hanna: - Vit finna altíð uppá sjálvi. Eg havi ongantíð givið Lars nakran lista, og tað plagar at rigga allíkavæl.
Lars: - Ja, Hanna dugir væl at keypa til mín, og tað riggar altíð hjá henni. Men hon hevur onkuntíð skift gávuna frá mær um.
*Nær verða jólagávurnar keyptar?*
Lars: – Vit plaga altíð at vera í góðari tíð at keypa jólagávurnar til øll hini. Men eg bíði sum oftast til seinast við gávuni til Hannu. Eg keypi hennara gávu 23. desember
Hanna: - Eg eri í betri tíð enn hann, og eg plagi at keypa hansara gávu einaferð í desember mánaði.

## Hanna Maria og Jóhan Hans

*Hvør keypir jólagávurnar, ið verða latnar frá tykkum?*
– Tað er altíð Hanna Maria
*Hvussu nógvar gávur keypa tit tilsamans?*
Hanna Maria – Uha, tað er ringt at vita...
Jóhan Hans: -30?
Hanna Maria: - Nei, ikki so nógvar. Tað vera nokk einar 20 tilsamans, vildi eg mett.
*Plaga tit at keypa stórar gávur til hvønn annan?*
– Ja, tær eru eitt sindur dýrar, tað haldi eg.
*Eru tað egin hugskot ella fáa tit ein nágreiniligan ynskilista við frá makanum?*
Hanna Maria: - Eg finni altíð gávurnar til Jóhan Hans sjálv.
Jóhan Hans: - Hon plagar at geva mær ein ynskilista, so havi eg nøkur ting at velja ímillum.



*Nær verða jólagávurnar keyptar?*
Hanna Maria: - Eg keypi altíð jólagávurnar í desembermánaði.
Jóhan Hans: - Eg havi bara eina gávu at keypa, tað er til konuna, og hon verður keypt í síðsta eygablikki.